

*Samstarvsavtala er nú gjørd millum Sands kommunu og Húsavíkar kommunu, har børnini í Húsavíkar kommunu, sum eisini fevnir um Dal og Skarvanes, kunnu koma í barnagarð og nýggja barnaskúlan á Sandi, sum eisini hýsir frítíðarskúlanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tríggjar nýggjar barnafamiljur á Sandi

**SANDUR Meðan fólkatalið í Sandoynni hevur verið minkandi í fleiri ár, gleðir tað borgarstjóran í Sands kommunu, Brand Sandoy, at tríggjar barnafamiljur júst eru fluttar til Sands at búgva**

Vilmund Jacobsen

Nú er eitt lítið ár síðan, at Brandur Sandoy gjørdist borgarstjóri í Sands kommunu.

Hetta er fyrsta skeiðið hjá honum í kommunalpolitikki, og hann heldur, at hesir 11 mánaðirnir, sum farnir eru av tíðini hjá honum í borgarstjórasessinum, kanska hava verið eitt sindur buldrasligir. Kortini heldur hann, at hetta hevur verið ein spennandi og áhugaverd tíð.

Borgarstjórastarvið í Sands kommunu er hálvtíðarstarv, men Brandur Sandoy er eisini seyðabóndi. Hagin, har seyðurin hjá honum gongur, liggur á eystursíðuni á oynni, norður móti Skopun.

– Eg havi umleið 200 seyðir. Hetta tekur ikki so nógv av mínari tíð til dagligt, undantikið tá farið verður á fjall, og tá slaktið er fyri um heystarnar.

Brandur sigur, at Sands kommuna kundi havt borgarstjóra í fulltíðarstarvi, men hevur valt at hava hetta sum hálvtíðarstarv.

– Eg veit heldur ikki, um grundarlag veruliga er fyri fulltíðarstarvi sum borgarstjóri í kommununi, leggur hann aftrat.

### Fólk flyta til

Fólkatalið á Sandi liggur millum 550-560, og bygdin er eins og aðrar bygdir í Sandoynni vorðin fámentari við árunum.

Borgarstjórin kann tó fegnast um, at tríggjar ungar barnafamiljur júst eru fluttar til Sands at búgva.

> **... eg fegnist um, at barnatalið á Sandi við hesum tilflytingum fær eitt skump í rætta endan...**
> BRANDUR SANDOY

– Onkur hevur keypt sær hús, meðan onnur eru farin at leiga og vilja ivaleyst hyggja seg um, áðrenn avgerð verður tikin. Hetta eru fólk, har í minsta lagi annar parturin hevur røtur í oynni.

Brandur Sandoy kann soleiðis eisini fegnast um, at barnatalið á Sandi við hesum tilflytingum fær eitt skump í rætta endan.

### Avtala um skúla

Sands kommuna og Húsavíkar kommuna, sum eisini fevnir um Dal og Skarvanes, hava nú gjørt eina avtalu um samstarv, sum bæði fevnir um barnagarð og skúla á Sandi.

– Samstarvið merkir, at børn í Húsavíkar kommunu nú bæði kunnu koma í okkara barnagarð og nýggja barnaskúlan við frítíðarskúla, har næmingar í 1. flokki og til og við 5. flokki ganga.

Brandur Sandoy vísir á, at Sandoyar Skúlasamband, sum hevur umboð úr kommununum í oynni, umsitir samstarvið um meginskúlan, har næmingar ganga í 6. flokki og upp í 10. flokk.

– Hetta samstarvið, sum vit nú hava gjørt við Húsavíkar kommunu, fevnir soleiðis um børnini, sum ikki hava aldur til 6. flokk, leggur borgarstjórin aftrat.

*vilmund@sosialurin.fo*